# HVØR ÆTLAR SÆR AT GERA

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein / Uni Holm Johannesen

## Brenni fyri politikki

### Rúna Sivertsen

**SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN**
**Fyrrv. løgtingskvinna**

Nú er ikki nøkur formlig uppstilling gjørd í Sjálvstýrisflokkinum, men tá eg havi skrivað politiskar greinar seinastu tíðina, havi eg undirskrivað meg sum valevni Sjálvstýrisfloksins, og eg rokni eisini við, at eg verið á listanum til løgtingsvalið.

Eg eri ikki komin har til enn, at eg havi hug at sleppa politikki. Tað brennir framvegis inni í mær. Eg havi hug at verða við til at gera broytingar í samfelagnum.

Tað er eisini umráðandi, at kvinnur eru við til at mynda løgtingið og samfelagið annars. Eg eri kanska ikki altíð samd í, hvussu vit fáa fleiri kvinnur virknar, ella hvør orsøkin er til, at kvinnur ikki eru eins væl umboðaðar, sum menn eru. Kvinnur hugsa natúrliga meira um heimið um menn, og tær vilja ikki ordiliga sleppa tí partinum, hóast menninir eisini gera nógv heima. Og tá tú ert við í politikki, so skalt tú gera tær greitt, at tað kostar nógva tíð.



## Føroyar ov lítlar til fólkaræði

### Sámal P. í Grund

**SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN**
**Fyrrv. landsstýris- og løgtingsmaður**



Eg havi ikki hug at stilla upp aftur til løgtingsvalið. Eg síggi ikki nakra veruliga meining í føroyskum politikki í løtuni. Tað verður eingin veruligur politikkur førdur, og ongar langtíðarætlanir verða gjørdar. Støðan er verri, enn hon nakrantíð hevur verið. Einstaklingar føra seg fram, sum teir hava hug, og floksleiðslurnar eru alt ov veikar. Tí ber ikki til at føra veruligan politikk og gera semjur sum halda.

Føroyar eru helst ov lítlar til fólkaræði. Ein politikari skal allatíðina taka atlit til, at hann vil verða afturvaldur, og tí skal hann ikki koma upp á tvørs av veljarunum. Og so hugsa politikararnir bara um, at teir skulu ikki traðka á hendan ella handan veljaran, og úrslitið er, at tú fært ongan reellan politikk.

## Ongar tankar um comeback

### Henrik Old

**JAVNAÐARFLOKKURIN**
**Fyrrv. løgtingsmaður**

Eg gavst í politikki til seinasta løgtingsval, og eg havi ongar tankar gjørt mær um, at eg skal stilla upp aftur nú.

Mánakvøldið hevur valfelagið hevur suðuri fund, og hóast uppstilling til løgtingsvalið ikki stendur á skránni, so slepst neyvan undan, at prátað verður um tað, nú valið nærkast. Vónandi kunnu vit finna onkran her suðuri, sum kann stilla upp. Og eg eri avgjørt ikki fyrsta boðið.

Nú Føroyar eru blivnar eitt valdømi, er tað truplari hjá fólki í útjaðaranum at verða vald á ting. Tað er ikki longur nóg mikið hjá øllum bert at fáa atkvøður í sínum lokaløki, og tí skulu valevni kanska hava markerað seg alment onkursvegna, áðrenn tey stilla upp. Valevnini skulu hava eitt grundarlag í lokaløkinum og eisini kunna taka atkvøður her og har fyri at verða vald.



## Útilokar einki í framtíðini

### Kristina Háfoss

**TJÓÐVELDI**
**Fyrrverandi løgtings- og landsstýriskvinna**



Í dag nýti eg mína orku í føroyska vinnulívinum – í TF samtakinum – og eri ikki í politikki.

Vænti ikki at eg stilli upp til komandi løgtingsval. Men tá tú hevur stóran áhuga fyri samfelagsligum viðurskiftum og fyri, at vera við til at menna okkara land, so skal eg ikki útiloka, at eg kundi roynt meg í politikki aftur í framtíðini. Í politikki ber til at arbeiða fyri einum betri samfelag og at fáa ávirkan, ið kann flyta samfelagið rætta vegin. Tí hevur politikkur stóran týdning, og fylgi eg eisini væl við í tí, ið hendir hesum viðvíkjandi.

Gongdin í føroyska vinnulívinum hevur eisini stóra ávirkan á, hvussu vit kunnu menna okkara samfelag framyvir. Tí er tað sera gevandi at kunna vera við til at menna føroyskt vinnulív í hesum døgum.

Havi ikki tikið nakra endaliga støðu til, um eg stilli uppaftur í framtíðini, men hetta verður væntandi ikki á komandi løgtingsvali.

## Eg umhugsi støðuna

### Bárður Nielsen

**SAMBANDSFLOKKURIN**
**Fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður**

Eg havi ikki tikið nakra endaliga støðu til, um eg eri hugaður at stilla uppaftur til løgtingsval. Eg skal ikki útiloka, men eg kann heldur ikki siga, at eg fari at gera tað. Eg hevði nøkur góð ár í politikki, og eg treivst sera væl.

Nú er minni eitt ár til valið, so eg veit eisini, at eg skal gera upp við meg sjálvan innan stutta tíð, um eg skal stilla uppaftur.

Stilli eg uppaftur, so skal tað verða tí, at eg havi nakað upp á hjarta og haldi meg kunna ávirka mál rætta vegin.

